LM-053/2025

ETISKA RÁÐIÐ

Fylgiskjal 4.

Hoyringssvar til Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli (*Heimild til kommunur at yvirvaka serliga útsett øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu, við vakmyndatóli)*

Etiska ráðið takkar fyri høvið at gera viðmerkingar til lógaruppskotið um yvirvøku við vakmyndatóli.

Yvirvøka av almennum støðum ber við sær týðandi etiskar avbjóðingar. Hóast tað er gjørligt, at yvirvøka undir røttum treytum kann økja um tryggleikan í býarlívinum við antin at fyribyrgja álvarsligum brotsverkum, ella at lætta um uppkláring av teimum, er tað ein týðandi rættur hjá borgarum at kunna ferðast, samskifta og virka frítt, uttan at uppliva støðugt eftirlit. Innsavnan av upplýsingum frá vakmyndatólum er grundleggjandi eitt inntriv í persónliga frælsi og privatlív borgarans, og ein aðaltáttur í einum frælsum samfelag má vera at avmarka slík inntriv frá myndugleikum. Etiskt viðkomandi spurningar eru tí, nær hóskandi javnvág er millum tryggleika fyri borgaran og rættin til privatlív, og hvussu stórt inntriv í privatlívi borgarans myndugleikar kunnu loyva sær.

Umframt at gera seg inn á rættindi til frælsi og privatlív, eru stóru vandarnar við yvirvøku teir, at upplýsingar kunnu misnýtast, og at valdið hjá myndugleikum kann gerast ov stórt. Upplýsingar kunnu misnýtast við eitt nú at enda í skeivum hondum, ella verða nýttir til endamál sum eru óviðkomandi fyri upprunaligu orsøkina til at innsavna teir. Harafturat kunnu avgerðir um at seta upp vakmyndatól eitt ávíst stað vera grundað á fordómum um, hvørjir sosialir bólkar serstakliga eiga at verða undir eftirliti, og í ringasta føri kunnu upplýsingarnar føra til øktan mismun mótvegis einstaklinum ella bólkum. Valdið hjá myndugleikum kann gerast ov stórt, t.d. við at teir fáa atgongd til upplýsingar um eitt nú ferðslumynstur og sosialt virksemi hjá borgarum, meðan borgarir ikki hava møguleika at vita hvørjir upplýsingar eru til, og hvør hevur atgongd til teir og hví. Um upplýsingar frá vakmyndatólum kunnu samkoyrast við upplýsingar aðrastaðni frá, ber til at fáa eitt sera nært og greitt innlit í lívinum hjá einum borgara, og inniber hetta møguleikan fyri einum ógvusligum ójavna í valdi millum myndugleikar og borgarar. Slíkir vandar við øktari yvirvøku kann føra víðari við sær, at álit borgarans mótvegis mynduleikum minkar ella hvørvir.

Tað hevur týdning at viðurkenna, at lógaruppskotið er eitt stig nærri at einum fullfíggjaðum yvirvøkusamfelagi. Harvið ikki sagt, at uppskotið ikki kann forsvarast, men ein slík viðurkenning er alneyðug fyri at kunna umganga, at mørkini fyri, hvørji inntriv í privatlív og persónliga frælsi kunnu

ETISKA RÁÐIÐ

góðtakast, ikki støðugt verða flutt. Um fylgjast skal einari vanligari meginreglu í einum liberalum demokratiskum samfelagi, kann staturin bert gera inntriv í privatlív borgarans, um tað er neyðugt og hóskandi, og um man nýtir tað amboðið, sum krevur tað minsta inntrivið fyri at røkka einum legitimum endamáli. Tað má tí støðugt tryggjast, at kostnaðarbýtið millum øktan tryggleika og mist privatlív er vælgrundað og gjøgnumskygt hjá borgarum, og at har eru greiðar treytir og avmarkingar fyri allari yvirvøku.

Umframt hesar yvirskipaðu viðmerkingar til yvirvøku við vakmyndatólum sum heild, viðurkennir Etiska ráðið, at núverandi lógaruppskot tykist at vera skilagott avmarkað. Ráðið vísir her serliga til tær ásetingarnar, sum 1) avmarka nýtsluna av upptøkum til viðgerð av álvarsamum lógarbrotum, 2) bara loyva løgregluni at viðgera persónupplýsingar frá upptøkunum, 3) krevja at upptøkurnar skulu strikast eftir 30 dagar, og 4) krevja at øll skipanin skal endurskoðast um 5 ár. Hesar ásetingar hava stóran týdning fyri at verja borgarar ímóti óhóskandi inntrivum frá myndugleikunum, og tað er við hesum avmarkingunum í huga, at Etiska ráðið ongar viðmerkingar hevur til sjálvt lógaruppskotið.

Tó vil Ráðið staðiliga mæla til – um hetta ikki longu er ætlað – at hesi 5 fyrstu árini vera nýtt til at savna inn royndir á skipaðan hátt, soleiðis at tað kann staðfestast hvørt yvirvøka hevur ynskiligu ávirkanina á fyribyrging og/ella uppkláring av brotsverkum ella ikki. Ráðnum vitandi, er eingin greið semja í granskingarumhvørvinum um, hvørt økt yvirvøka hevur slíka ávirkan (t.d. um tað kann *fyribyrgja* brotsverk, og ikki bara flyta tey aðrastaðnis). Tí hevur tað stóran týdning, at slík vitan verður innsavnað, og at har finst vitan frá núverandi støðu sum til ber at samanbera við. Um vit ikki hava hesa vitanina, ber ikki til at siga um yvirvøka er neyðug og hóskandi, og um kostnaðarbýtið millum mist privatlív og øktan tryggleika er rímiligt.

Etiska ráðið, 5. novembur 2025